# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Verður alt tikið við í metingina, haldi eg, at vit eiga at lata Guantanamo aftur*

*(Robert Gates, verjumálaráðharri)*

# Sjáldsamar myndir av Sólini



*Granskarar á amerikonsku rúmdarumsitingini NASA eru ovurfegnir um nakrar myndir, sum fylgisveinurin Hinode hevur tikið, og sum vísa sera sterk gassgos á Sólini. Sambært granskarunum er gassið fleiri milliónir stig heitt, og gosini eru so sterk, at tey kunnu órógva samskiftisútgerð á Jørðini.*

# Veðurlagsbroytingarnar elva til vatntrot og hungur

**Aftan á 2050 fara 1,5 mia. fólk at hava ov lítið vatn, og 200 mió. fólk fara at líða hungur**

Tríggjar frágreiðingar, sum veðurlagsserfrøðingarnir hjá ST fara at almannakunngera um einar fjúrtan dagar, ávara um munandi broytingar í heiminum aftan á 2050. Eftir tað fara broytingarnar í veðurlagnum at elva til vatntrot, hungur og vatnflóð. Umleið ein mia. fólk verða ávirkað av vatntroti, 200 mió. fólk fara at líða hungur, og umleið 50 mió. fólk noyðast at stríðast við vatnflóð.

Serfrøðingarnir hjá ST siga, at vit fáa turk, sum kemst av, at tað fer at regna aðrastaðni enn fyrr, og tað er lítil uggi í, at summ i fáa meiri vatn, tí har fer tað óvanliga nógva avfallið at elva til sjúkur so sum tyfus og malaria.

- Sjúkurnar verða tann stóra avbjóðingin, sigur danska Kirsten Halsnæs sum er veðurlagsgranskari á Risø-stovninum. Hon og hinir veðurlagsgranskararnir siga, at ger mannaættin álvara av at skerja kol-, olju- og gassnýtsluna munandi, verða avleiðingarnar ikki so stórar.

# Hann bleiv myrdur

**Cricket-venjarin hjá Pakistan, onglendingurin Bob Woolmer, varð funnin deyður á hotellinum. Nú hava kanningar staðfest, at hann bleiv myrdur**

Bob Woolmer varð funnin deyður á hotellkamari sínum á Jamaica, eftir at pakistanska landsliðið í cricket hevði tapt ein avgerandi dyst ímóti Írlandi í HM-kappingini. Bob Woolmer var venjari hjá pakistanska landsliðnum, og ósigurin ímóti írum gjørdi, at Pakistan slapp ikki víðari í kappingini.

Tað fór sum eldur um allan ítróttarheimin, tá tað fréttist, at Bob Woolmer var funnin deyður á hotellkamarinum, og løgreglan á Jamaica, har HM-kappingin er, fekk alt fyri eitt illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt. Í gjár avdúkaði líkskoðanin so, at Bob Woolmer var vorðin kvaldur, og løgreglan sigur nú, at málið verður kannað sum morð.

Bretsku myndugleikarnir hava sent ein av sínum dugnaligastu kriminalmonnum til Jamaica at hjálpa løgregluni har. Myndugleikarnir á Jamaica siga, at enn er eingin skuldsettur í málinum, men at fleiri fólk skulu avhoyrast. Millum annað skulu allir spælararnir á pakistanska cricketlandsliðnum avhoyrast.




*Bob Woolmer var prúður maður, og løgreglan heldur tí, at drápsmenninir vóru fleiri í tali*

## STUTT SAGT

### Stillar upp

Í USA hevur senatorurin John Eswards gjørt av at royna at gerast forsetavalevni hjá demokratunum á valinum næsta ár. Hann er ikki óroyndur á økinum, tí í 2004 stillaði hann upp sum varaforsetaevni hjá John Kerry. Í gjár kunngjørdi hann, at hann hevur gjørt av at royna aftur hesaferð. Higartil hava Hillary Clinton opg Barrack Obama fingið at kalla alla umrøðuna sum demokratisk forsetavalevni, men John Edwards skal ikki undirmetast. Millum annað hevur hann stóra undirtøku í statinum Iowa, sum verður hildin at hava stóran týdning í demokratiska uppstillingarvalinum.

### Bíligari at flúgva

ES hevur gjørt av, at bæði evropeisk og amerikonsk flogfeløg kunnu sleppa at flúgva millum øll ES-lond og floghavnir í USA. Avgerðin hevur fingið sera góða móttøku í USA, og longu nú verður roknað við munandi fleiri og samstundis munandi bíligari flogferðum um Atlantshavið. ES-nevndin hevur mett, at ferðafólkatalið um Atlantshavið verður 26 mió. størri um fimm ár enn í fjør, og at tað fer at geva umleið 80.000 nýggj arbeiðspláss í ferðavinnuni.

### Statoil til Irak

Amerikanskar keldur vilja vera við, at norska oljufelagið Statoil hevur ætlanir um at fara undir virksemi í Irak. Tíðindini eru frá vælvitandi keldum í New York, men kunningarstjórin hjá Statoil, Rannveig S. Stangeland, vil hvørki vátta ella avsanna tey. Annars hevur Statoil havt tann politikk, at felagið fer ikki undir nakað virksemi í Irak, fyrr enn viðurskiftini eru vorðin tryggari, og fyrr enn landið hevur fingið eina nýggja lóggávu á oljuøkinum.